# Síðsti møguleiki at síggja Kúlla Knút

**Síðstu sýniningarnar av Kúlla Knúti vera nú um vikuskiftið. Higartil hava eini 3.500 fólk sæð leikin, men nú verður ikki spælt longur**

SJÓNLEIKUR
*Heri á Rógvi*

Leikurin um Kúlla Knút hevur síðani 12. oktober verið spældur í Sjónleikarhúsinum í Havn. Frá fyrstu til síðstu sýning hevur at kalla verið útselt. Men nú verður spælt fyri seinastu ferð.

Um vikuskiftið verða sýningar fríggjakvøldið kl. 18 og leygardagin kl. 17.

Verður útselt til sýningina kl. 17 leygardagin, so fara leikararnir eina síðstu ferð á pallin leygarkvøldið kl. 20. Hetta verður so tann síðsta sýningin, tí longu sama kvøld verður pallurin tikin niður. Hetta verður gjørt fyri at geva pláss til Leikhúsjól, sum skulu á pallin í Sjónleikarhúsinum í jólamánaðinum.

Úr Sjónleikarhúsinum siga tey, at eini 3.500 fólk í alt hava sæð leikin um Kúlla Knút. 35 sýningar verða spældar, og so at siga hvørja ferð er spælt fyri fullum húsi í Sjónleikarhúsinum.



*Kúlla Knút hevur spælt fyri fullum húsi í Sjónleikarhúsinum síðani 12. oktober, men nú verður spælt fyri seinastu ferð.*
*Mynd: Finnur Justinussen.*

Áhugin at koma av bygd at síggja leikin hevur heldur ikki bilað nakað. Onkur eykasýning er eisini spæld fyri eitt nú suðuroyingum, sum ikki vildu vitja høvuðsstaðin uttan at síggja Kúlla Knút.

Leikurin er upprunaliga skrivaður av dananum Gunnar Geertsen. Hann er víðagitin í sjónleikahøpi í Danmark, og hann avgjørdi at gera ein barna- og ungdómssangleik. Leikurin er eisini fyri tað heilt nógva sangur.

Sangirnir og leikurin eru týtt til føroyskt av Elini á Rógvi, sum eisini hevur leikstjórnað leikin, og Allani Dalsgarð, og tað hevur heldur ikki ligið illa fyri við at skapa áhuga millum føroysk børn.

Heili tjúgu leikarar hava spælt við. Teir flestu av hesum leikarunum eru ungir og mestsum óroyndir leikarar, ið fingu møguleikan at kasta seg út í nakað nýtt.

Sangurin um Kúlla Knút roynir seg í hesum døgum sum eykalag á 15 tær bestu hjá Útvarpi Føroya.

Hóast sangurin kanska livir víðari á tónatindum, so enda framførslurnar um vikuskiftið.

Atgongumerki kunnu fáast á Kunningarstovuni í Havn.

# Hólmgongan varð av ongum

**Nøkur nýggj gøtunøvn vóru tað hendingarríkasta á býráðsfundinum hjá Tórshavnar býráð hóskvøldið**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA
*Heri á Rógvi*

Býráðsfundurin hjá Tórshavnar býráð í kvøld gjørdist ongantíð til nakra uppgerð, sum kanska roknað varð við.

Í Dimmalætting hevur borgarstjórin, Jan Christiansen, givið ilt av sær um atburðin hjá Heðini Mortensen, varaborgarstjóra.

Hann vísir á, at Heðin Mortensen hevur alt ov góðan hug at kalla seg virkandi borgarstjóra, og hann hevur lyndi til at taka heiðurin fyri ting, ið hann ongar heiður eigur fyri. Samstundis fílíst hann á brot á tagnarskyldu.

Tann kanska væntaða hólmgongan varð av ongum. ístaðin var Tórshavnar býráð so samt sum ongantíð fyrr á býráðsfundi hóskvøldið.

Alt varð samtykt einmælt á einum rekord stuttum fundi.



*Jan Christiansen og meirilutin í Tórshavnar býráð halda fram við sama stev.*

### Tjóðveldið til reiðar

Skuldi hugurin hjá serliga Fólkaflokkinum at vera í meiriluta við Sambandsflokkin minkað niður um pínumarkið, so er Tjóðveldisflokkurin klárur. Hetta ger flokkurin greitt í einum tíðindaskrivi. Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin eiga í alt sjey sessir í Tórshavnar býráð, og hetta er nokk til ein meiriluta.

– Tjóðveldisflokkurin ásannar, at tað áhaldandi stríðið millum báðar borgarstjórarnar, Jan Christiansen úr Fólkaflokkinum og Heðin Mortensen úr Sambandsflokkinum, er skaðiligt fyri Tórshavnar Kommunu.

Nú hetta stríð stendur í ljósum loga og ikki kann dyljast fyri almenninginum longur, er Tjóðveldisflokkurin sannførdur um, at stundin er komin til at fara undir tingingarnar um at skipa ein nýggjan meiriluta, sum tekur býráðsarbeiðið í fullum álvara og vil arbeiða borgarunum til frama, skrivar Tjóðveldisflokkurin í tíðindaskrivi.

Jan Christiansen heldur tó bæði beinini á jørðini, og hann fer ikki frá borgarligu samgonguni til tað meira sjálvstýrandi sum er.

### Gøtunøvn

Fyri tað nógva vóru tað nýggj gøtunøvn, ið komu fyri dagin á býráðsfundinum.

Úti á Argjum er komin ein "Hagarás". Við norðara ringveg verður í framtíðini ein Poul Juels gøta.

Í Kaldbak hava tey fingið eina røð av nýggjum nøvnum. Tað er í sambandi við, at grind skal skiftast í húsapartar, at neyðugt er við gøtunøvnum og hvørt hús skal hava eina adressu. Eisini er ein løgtingslóg komin, ið krevur, at øll hús skulu hava gøtunavn og nummar. Hetta verður fyrst og fremst gjørt fyri, at onkur misskiljingar skulu koma fyri, tá sløkkilið, sjúkrabilur ella annað líknandi verður boðsent í einari neyðstøðu.

Fólk í Kaldbak og øll onnur mugu í framtíðini venja seg við fylgjandi nøvn: á Bø, Krossgøta, Mjólkargøta, Skriðubakki, við Á, á Soylugørðum, á Gørðum og á Varðnípu.

Eftir hvat skilst taka nøvnini støði í staðarnøvnum har á leiðini.

Somuleiðis vórðu eykajáttanir til fíggjarætlanina hjá Tórshavnar kommunu og Tórshavnar havn á skránni á býráðsfundinum. Meira stendur um hetta aðrastaðni á síðuni.



Kiwanis Tórshavn:

# 60.000 kr. til vælgerandi endamál

**Hjálparfelagsskapurin Kiwanis Tórshavn gav fríggjadagin 60.000 kr. til trý vælgerandi endamál. Allastaðni kemur peningurin væl við**

GÁVUR
*Birita í Dali og Mariann Mortensen*

Heri Simonsen formaður í Kiwanis Tórshavn handaði fríggjamorgunin tríggjar kekkar. Spastikarafelag Føroya fekk 10.00. Frítíðarheimi í Skrivaragøtu fekk handað 25.00 kr. Eisini Føroya Felag móti krabbameini fekk 25.00 kr.

Sólrun Mortensen, formaður í Spastikarafelag Føroya, tók í móti teirra kekki. Hesir pengarnir fara til eina lyft, sum kann hjálpa spastikarum at koma upp á hest. Mett verður, at hendan likamsliga venjingin er sera gagnlig fyri spastikarar, og Sólrun segði eisini, at pengarnir komu ógvuliga væl við. Lyftan kostar 30.000. Tórshavnar kommuna hevur játtað at latið tær 20.000, og restin kemur so frá Kiwanis Tórshavn.

Fyri Frítíðarheimið í Skrivaragøtu tók Ingun Mohr Jacobsen, leiðari fyri heimið, ímóti einum gávukekki, sum var á 25.000 kr.

Pengarnir fara sum ískoyti til ein buss fyri menningartarna, sum leingi hevur verið tørvur á. Hendan buss hevur Frítíðarheimið eisini leingi arbeitt við at fáa til vega, og teirra arbeiðið endar ikki við hesum pengunum, men hetta er eitt munagott ískoyti, sigur Ingun Mohr Jacobsen.

Fríðtíðarheimið í Skrivaragøtu fyllir 25 ár sunnudagin. Lesið aðrastaðni í blaðnum meira um handan dagin.

Føroya Felag móti Krabbameini fekk 25.000 kr, sum Jansy Gaardlykke, ráðgevandi sjúkrasystir, tók ímóti. Hesir pengar fara til eitt átak fyri kvinnur, ið kallast "Look good, feel better". Hendan verkætlanin skal styrkja um sjálvsálitið hjá kvinnum, ið fáa viðgerð fyri krabbamein.

—Kvinnur, sum eru raktar av krabbameini, kunnu ofta kenna seg meiri sjúkar, enn tær veruliga eru, orsaka av teirra útsjond. Tí kunnu tær nú ókeypis fara á skeið á landsjúkrahúsinum, har tær fáa vegleiðing í húðrøkt og andlitssmyrlsli, sigur Jansy Gaardlykke.

Slík átøk verða gjørd aðrastaðni í verðini, og tey fáa sera góða undirtøku.

Kiwanis er ein alheimshjálparfelagsskapur, ið veitir hjálp til minnu ment.

Allar hesar 60.000 kr, sum Kiwanis Tórshavn hevur latið í dag, koma frá lutaseðlasølu, har ein bátur varð burturlutaður. Kiwanis miðjar ímóti at lata pengar tvær ferðir um árið.

Heri Simonsen, formaður fyri Kiwanis Tórshavn, segði, at mangan kundi tað tykjast sum um, at gjørt varð alt ov lítið við at stuðla. Hjá Kiwanis leggja teir seg eftir at stuðla minnimentum og serliga børnum. Heri vísir á, at tað í ár gekk sera væl í hond við teirra lutaseðlasølu, og inntøkan hevur ongantíð verið so góð.



*Kiwanis Tórshavn kundi fríggjamorgunin lata heili 60. 000 kr. til vælgerðandi endamál. F.v. Jansy Gaardlykke, ráðgevandi sjúkrasystir hjá Føroya Felag móti Krabbameini, Sólrun Mortensen, formaður í Spastikarafelagnum, Ingun Mohr Jacobsen, leiðari á Frítíðarheiminum í Skrivaragøtu. Aftanfyri stendur Heri Simonsen, formaður fyri Kiwanis Tórshavn.*
*Mynd: Jens Kristian Vang.*

25 limir eru í felagnum, og teir fara í jólamánaðinum at selja jólatrø. Hetta er tað seinna árliga átakið, ið vanliga eisini kemur heilt fitt í kassan. Alt arbeiðið í Kiwanis er sjálvboðið.

Vit ynskja Kiwanis og feløgunum til lukku við gávunum.

# Tórshavnar havn stendur við øllum kostnaðinum

**Hvørki Smyril Line ella Landsstýrið hava pening at gjalda teirra part av nýbyggingunum í Tórshavnar havn, og tí verður tað Tórshavnar kommuna, ið fer at rinda allan kostnaðin**

TÓRSHAVNAR HAVN
*Heri á Rógvi*

Hjá Tórshavnar havn er tað galdandi, at serliga nýggja Norrøna ger, at neyðugt er við 33,7 mió. í eykajáttan í ár. Peningin eigur Tórshavnar havn tøkan.

Fyri tað nógva er talan um byggiverkætlarnir, ið eru dýrkaðar. Eitt nú dýpingin við eystaru bryggju, ið gjørdist nógv seinkað av granatum og øðrum góðum, ið vístu seg at liggja goymd í havbotninum.

Tað er tó serliga nýggja Norrøna og nýggja suðuroyarskipið, ið hava gjørt rokningina hjá Tórshavnar havn og harvið Tórshavnar kommunu til væl størri, enn upprunaliga varð ætlað.

—Tað hevur víst seg, at bæði landið og Smyril Line ikki hava kunnað goldið sín part í torninum, ið verður landgongdin hjá ferðafólki. Hetta ger so, at vit mugu gjalda allan kostnaðin, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri.

Men tað verður ikki uttan treytir, at Tórshavnar kommuna fer at gjalda so mikið nógv.

—Upprunaliga ætlanin var, at kommunan, landið og Smyril Line skuldu gjalda hvør sín triðing. Landið og Smyril Line hava boðað frá, at tey ikki kunna gjalda, men tey koma so at gjalda í brúksgjaldi, sigur Jan Christiansen.

Brúksgjaldið hjá Smyril Line verður tvær milliónir um árið tey næstu trý árini, og hetta svarar sostatt til teirra part av kostnaðinum. Tornið verður mett at fara at kosta einar 17 mió.

Eftir trý ár skal Smyril Line gjalda ein part av gjaldinum fyri veðlíkahald og reingerð v.m. fyri tornið.

Tornið fer at kunna nýtast til nýggja suðuroyarskipið eisini, men tað verður av ongum, so leingi landið ikki er sinnað at gjalda so ella so, sigur Jan Christiansen.

Sum støðan er nú, eru land og kommuna langt frá hvørjum øðrum í spurninginum um, hvør skal gjalda fyri atløguplássið til nýggja suðuroyarskipið, ið verður sett í sigling á heysti 2004.

Kommunan hevur verið í Danmark saman við skiparanum á Smyrli og roynt seg í einum simulator, og tað hevur víst, at ætlarnirnar við atløgubryggju fara at rigga væl, men trupulleikin er bert tann, at eingin vil gjalda.

Skal Tórshavnar kommuna gjalda – og tað kann henda seg – so fer kommunan at krevja peningin innaftur á ein ella annan hátt.

—Vit vilja hava pengarnir innaftur so ella so. Skal landið eiga part av havnini, so skal ein greið skriftlig avtala fyriliggja, staðfestir Jan Christiansen.

## Nýggjur 100 kr. seðil




*Nýggi 100 kr. seðilin hevur nakrar trygdarbroytingar í mun til tann verandi.*

Danmarks Nationalbank hevur útgivið ein nýggjan danskan 100 kr. seðil. Hesin er meinlíkur teimum verandi við somu útsjónd og Carl Nielsen avmyndaðum.

Munurin er tann, at tann nýggi seðilin hevur eitt hologram og fluoreserandi litir, sum koma til sjóndar í ultraviolettum ljósi.

Endamálið við broytingunum er at tryggja, at færri falsanir koma fyri.

Sagt verður í tíðindaskrivi, at talan av følskum donskum peningaseðlum er lítið, men allíkavæl verður tað hildið neyðugt at gera meira við trygdina.

Tær gomlu seðlarnir vera framvegis í gildi, men tað verða leypandi tiknir innaftur.

Aðrar seðlar í somu seriu av seðlum fáa eisini eina andlitsviðgerð á trygdarøkinum, og roknað verður við, at øll serian verður liðug broytt í 2004.

Bæði Føroya Sparikassi og Føroya Banki rokna við at fáa fyrstu eintøkini av nýggja seðlinum fyrst í komandi ári.

## Føroya Bjór í rættin

Føroya Bjór hevur fingið boð frá fútanum um at møta í Føroya rætti hin 15. januar 2003.

Orsøkin til vitjanin í rættinum er ein ákæra, ið reist er móti bryggjarínum fyri ólógligar rúsdrekkalýsingar. Tær eru ikki ólógligar fyrr enn dómarin sigur, at tær eru tað. Fútin heldur tó, at lýsingarnar eru skeivu megin markið.

Lýsingarnar talan er um stóðu í Dimmalætting fyri í ár. Tær umrøddu matuppskriftir, har ein partur av ráðvøruni var øl. Hesar góðu øl vóru frá Føroya Bjór, og myndir vóru av teimum.

Nær ein avgerð fyriliggur í málinum er ógvulig ringt at spáa um, tí tílík rættarmál verða oftani útsett og aftur útsett. Í øllum førum verður annar kapittul av rúsdrekka herferðini á hesum sinni í Føroya rætti 15. januar.